Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting:	4. nov. 2022
Mál nr.:	22/15353
Málsviðgjørt:	ARØ
Ummælistíð:	Frá 15. sep. til 6. okt. 2022
Eftirkannað:	9. okt. 2022

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)
(Hækking av inngjaldi og útgjaldi o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan (Barsilslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 174 frá 21. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 13, stk. 1, verður "kr. 25.000" broytt til: "kr. 27.000".

2. Í § 17, stk. 2, verður "smbrt." broytt til: "sbrt.", og í nr. 1 verður "men ikki 67 ár" broytt til: "men ikki hava nátt fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a.".

3. § 18, nr. 1, verður orðað soleiðis:
"1) fólkapensjón, fyritíðarpensjón og framskundað pensjón,".

4. § 18, nr. 2, verður orðað soleiðis:
"2) aðrar skattskyldugar almannaveitingar, tó ikki dagpening sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m., endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sbrt. § 25 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og lønaríkoyti til tillagað starv sbrt. § 21 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk,".

5. Í § 19, stk. 1 og 4, verður "0,86%" broytt til: "0,89%".

6. Aftan á § 23, men áðrenn yvirskriftina yvir § 24, verður sett:

"**§ 23 a.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at upplýsingar skulu skrásetast og sendast Barsilsskipanini elektroniskt, og kann áseta nærri reglur um elektroniska samskiftið."

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2023.

Stk. 2. § 1, nr. 1, er galdandi fyri øll útgjøld úr Barsilsskipanini eftir 1. januar 2023.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Lógaruppskotið skal gera føroysku Barsilsskipanina uppaftur betri við at hækka hámarkið fyri barsilsútgjaldi úr 25.000 kr. um mánaðin til 27.000 kr. um mánaðin. Fyri at fíggja økta útgjaldið er neyðugt eisini at hækka inngjaldið.

1.2. Galdandi lóggáva
Barsilspeningur er 100% av A-inntøkuni, sum løntakarin í miðal hevur móttikið seinastu 12 mánaðirnar undan barsilsfarloyvinum. Tó kann barsilspeningurin í mesta lagi vera 25.000 kr. um mánaðin umframt eftirlønargjaldið. Tá ið Barsilsskipanin varð sett á stovn í 2001, var hámarkið 35.000 kr. um mánaðin. Í 2004 varð hámarkið lækkað niður í 25.000 kr. um mánaðin og hevur síðan verið óbroytt. Í løgtingslógini er ein heimild til landsstýrismannin at hækka hámarkið við støði í lønargongdini í samfelagnum, men hon hevur ongantíð verið brúkt.

Inngjaldið til Barsilsgrunnin upp á 0,86% verður sum útgangsstøði goldið av allari móttiknari og rindaðari A-inntøku. Barsilsgjaldið varð hækkað úr 0,71% upp í 0,86% 1. januar 2021; samstundis varð rætturin til barsilspening longdur til 52 vikur eftir føðing.

Gjaldskyldug eru øll, sum fáa A-inntøku, sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, og sum hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár, og øll, sum rinda A-inntøku í Føroyum. Fólkapensjónsaldurin er ásettur í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Fólkapensjónsaldurin hækkar sambært § 4 í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

Barsilsgjald verður sum útgangsstøði goldið av allari móttiknari og rindaðari A-inntøku; undantikið er m.a. fólka- og fyritíðarpensjón. Í almannapensjónslógini er nú ásett eitt nýtt slag av pensjón, sum nevnist “framskundað pensjón”, og sum eisini eigur at vera fevnt av undantakinum. Talan er ikki um ein nýggjan málbólk, men heldur at nakrir borgarar í staðin fyri fyritíðarpensjón nú fáa framskundaða pensjón. Harafturat eru aðrar skattskyldugar almannaveitingar undantiknar barsilsgjaldinum. Sum undantak til undantakið er endurgjald fyri inntøkumiss sbrt. § 17, stk. 3, í forsorgarlógini, sbrt. § 18, stk. 1, nr. 2, í barsilslógini. Forsorgarlógin varð avtikin, tá ið løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur varð sett í gildi 1. januar 2021.

Í praksis verður barsilsgjald kravt av lønaríkoyti til tillagað starv, hóast tað ikki stendur í barsilslógini. Lønaríkoyti til tillagað starv er ein veiting frá Almannaverkinum, ið kemur í staðin fyri løn frá arbeiðsgevara; tí eigur barsilsgjald at vera rindað av lønaríkoytinum, og lønaríkoyti eigur at telja við í útrokningargrundarlagnum, tá ið barsilspeningur verður roknaður. Neyðugt er at nágreina barsilslógina í mun til verandi praksis.

Ongin áseting er í barsilslógini um talgilt samskifti.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at hækka hámarkið fyri mánaðarliga barsilsútgjaldið úr 25.000 kr. upp í 27.000 kr. Samstundis er neyðugt at hækka inngjaldið við 0,03 prosentstigum, fyri at undirskot ikki skal koma í Barsilsgrunnin. Eisini verða nakrar fylgibroytingar gjørdar,

soleiðis at barsilslógin verður í samsvari við broytingar í aðrari lóggávu, umframt at løgtingslógin verður tillagað praksis, og heimild verður givin landsstýrismanninum at áseta reglur um talgilt samskifti.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Síðan Barsilsskipanin varð sett á stovn í 2001, er hon áhaldandi broytt. Rætturin til barsilspening er m.a. tvífaldaður; úr 26 vikum eftir barnsburð upp í 52 vikur eftir barnsburð. Hóast áhaldandi batar eru gjørdir á rættin til barsilspening, er hægsta útgjaldið úr Barsilsskipanini ikki broytt í 18 ár, hóast miðalinntøkan hjá føroyskum løntakarum er vaksin nógv hesa tíðina. Við hesum lógaruppskotinum verður hámarkið fyri barsilspening hækkað við 2.000 kr. um mánaðin; úr 25.000 kr. upp í 27.000 kr. umframt eftirlønargjaldið. Á henda hátt fáa tey, ið vanliga tjena omanfyri 25.000 kr. um mánaðin, endurrindað upp til 27.000 kr. úr Barsilsskipanini, tá tey fara í barsilsfarloyvi.

Samstundis sum útgjaldið úr Barsilsskipanini verður hækkað, er neyðugt við fleiri inntøkum til Barsilsgrunnin fyri at fíggja økta útgjaldið. Hetta verður gjørt við at hækka barsilsgjaldið úr 0,86% upp í 0,89%. Barsilsgjaldið verður goldið av øllum móttiknum og rindaðum A-inntøkum.

Aldursmarkið fyri tey, sum hava skyldu at rinda barsilsgjald, er frá og við 16 ár til og við 66 ár. Skotið verður upp, at aldursmarkið heldur skal fylgja fólkapensjónsaldrinum, soleiðis at skyldan at rinda barsilsgjald heldur uppat, tá ið persónar fáa rætt til pensjón. Ásett er í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., at fólkapensjónsaldurin hækkar úr 67 árum upp í 67 ½ ár og síðan 68 ár. Fyri at tað ikki skal vera neyðugt leypandi at broyta aldursmarkið í barsilslógini, verður ásett, at aldursmarkið fylgir fólkapensjónsaldrinum, sum hann er ásettur í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

Í almannapensjónslógini er nú ásett eitt nýtt slag av pensjón, sum nevnist “framskundað pensjón”, og barsilsgjald eigur ikki at verða rindað av hesi pensjón. Talan er ikki um ein nýggjan málbólk, men heldur at nakrir borgarar í staðin fyri fyritíðarpensjón nú fáa framskundaða pensjón. Í praksis verður framskundað pensjón útgoldin á sama hátt sum fyritíðarpensjón, og hesi rinda tí ikki barsilsgjald av pensjónini í dag. Tí verður skotið upp at tillaga barsilslógina til praksis, soleiðis at ongin ivi er um, at barsilsgjald ikki skal rindast av framskundaðari pensjón.

1. januar 2021 varð løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur sett í gildi, og samstundis varð lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg sett úr gildi. Barsilsskipanin hevur eina tilvísing til hesa lóg, sum verður rættað við hesum lógaruppskotinum. Talan er um eina fylgibroyting, sum ikki hevur materiellar broytingar við sær.

Í praksis verður barsilsgjald kravt av lønarískoyti til tillagað starv eftir løgtingslóg um arbeiðsfrejmandi tiltøk. Barsilsskipanin er ein arbeiðsmarknaðarskipan, sum veitir endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku til løntakarar, ið fara í barsilsfarloyvi. Endurgjald verður somuleiðis veitt fyri tær veitingar, ið koma í staðin fyri løn. Tí eigur barsilsgjald eisini at verða kravt av lønarískoyti til tillagað starv. Við lógaruppskotinum verður barsilslógin rættað, soleiðis at barsilsgjald skal krevjast av lønarískoyti til tillagað starv.

Tað krevur heimild í løgtingslóg, um tað skal vera kravt av borgara ella fyritøku, at tey skulu samskifta við almennar myndugleikar elektroniskt ella talgilt. Í sambandi við, at ein nýggj KT-skipan til Barsilsskipanina verður fyrireikað, er neyðugt at fáa eina heimild í barsilslógina, soleiðis at tað kann verða kravt, at upplýsingar skulu latast Barsilsskipanini elektroniskt.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Umframt at lógaruppskotið er lagt til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og á hoyringarportalin hjá landsstýrinum, hava hesir partar fingið uppskotið til ummælis:

Akademikarafelag Føroya, Almannamálaráðið, Almannaverkið, Barsilsskipanin, Bioanalytikarafelagið, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Ergoterapeutfelagið, Fakfelag Sjómansskúlalærara í Føroyum, Farmakonomfelagið Føroyadeild, Felag Tænastumanna Landsins, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Felagið Maskinmeistaralærarar, Felagið Radiografar í Føroyum, Fiskimálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Flogskiparafelag Føroya, Fysioterapeutfelag Føroya, Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Handverkarafelag, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag, Føroya Reiðarafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Føroya Tekniska Lærarafelag, Føroysk Miðlafólk, Grafiska Yrkisfelagið, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðarafelag, Heilsumálaráðið, Heilsuhjálparafelag Føroya, Heilsurøktarafelagið, HK stat Føroya Deild, Javnstøðunevndin, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, Kommunulæknafelag Føroya, Kost- og Føðslufelagið, Landsfelag Handverkaranna, Ljósmøðrafelag Føroya, Løgmansskrivstovan, Maskinmeistara-felagið, Meginfelag Útróðrarmanna, Musikklærarafelag Føroya, Prestafelag Føroya, Samtak, Samverk, Serlæknafelag Føroya, Starvsfelagið, TAKS, Uttanríkis- og mentamálaráðið, Yngri Læknar, Yrkisfelag teirra, ið starvast í tryggingar-, fíggjar-, KT o.tíl. fyritøkum og Yrkisfelagið Miðnám.

Hoyringin var frá 15. september til 6. oktober 2022.

Niðanfyri er ein lýsing av innkomnu hoyringarsvarunum.

Akademikarafelag Føroya vísir á, at teirra limir eru fyri stórum lønarmissi, tá ið teir fara í barsilsfarloyvi. Hækkingin frá 25.000 kr. upp í 27.000 kr. munar langt frá nóg mikið. Gjaldið átti heldur at verið sett til 35.000 kr. ella heilt at samsvara veruliga lønarstøðið. Rættast er, at útgjaldið stendur í rímiligum lutfalli til inntøkuna, tí rindað verður inn í Barsilsgrunnin í mun

til inntøkuna. Felagið vísir eisini til skrivið frá akademisku fakfeløgunum um betri barsilssømdir og javnstøðu millum foreldur, sum varð sent løgmanni og landsstýrismonnunum í fíggjarmálum og umhvørvis- og vinnumálum 14. september 2022, sí fylgiskjal 13. Í skrivinum verður m.a. víst á, at fráveran hjá kvinnum frá arbeiðsmarknaðinum í sambandi við barsilsfarloyvi m.a. hevur ávirkan á lønarinntøku, eftirlønarsamansparing og onnur ognarviðurskifti hjá kvinnum í Føroyum. Ynskt verður, at tær 6 vikurnar, sum barsilsfarloyvið tilsamans varð longt við í sambandi við broytingarnar í barsilslógini í 2019 og 2020, skulu markast til pápan ella sammóðrina. Hoyringarsvarið frá Akademikarafelagnum er lagt við sum fylgiskjal 2.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur hesar viðmerkingar: Tá ið broytingar áður eru gjørdar í barsilslógini, hava hetta og undanfarin landsstýri m.a. raðfest at leingja tíðarskeiðið við barsilspeningi og at leggja lógarfesta eftirlønargjaldið oman á barsilspeningin. Nú, ið tíðarskeiðið við barsilspeningi er blivið 52 vikur eftir føðing, er tað fyrstu ferð, at hámarkið fyri mánaðarliga barsilsútgjaldiið verður hækkað. Barsilsgjaldið verður samstundis hækkað fyri at fíggja økta útgjaldið. Barsilsgjaldið er ásett soleiðis, at inngjøld og útgjøld javnviga í 2026, tá ið lógarfesta eftirlønargjaldið ikki longur hækkar. Vísir tað seg eftir hetta, at yvirskot verður í Barsilsgrunninum, kann hugsast, at peningurin fer at verða brúktur til at hækka hámarkið enn meira.

Skrivið frá akademisku fakfeløgunum um betri barsilssømdir og javnstøðu millum foreldur snýr seg í stóran um viðurskiftir, ið eru skipað í kollektivum sáttmálum. Tó eru viðmerkingarnar um hámarkið fyri mánaðarliga barsilsútgjaldið og markingin av fleiri vikum við barsilspeningi til pápan og sammóðrina viðkomandi her. Sí reglubrotið beint omanfyri í mun til hámarkið fyri mánaðarliga barsilspeninginum. Hugskotið um at marka fleiri vikur við barsilspeningi til pápan og sammóðrina verður ikki tikið við í hesum umfari.

Almannamálaráðið hevur ongar viðmerkingar. Sí fylgiskjal 3.

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya hevur leingi havt ta áskoðan, at núverandi hámarksupphædd er ov lág. Av tí, at barsilsgjaldið er í prosentum av A-inntøkuni, og hámarks-upphæddin er ein føst upphædd, veksur avlopið í Barsilsgrunninum sum frálíður. Mælt verður til, at avlopini í Barsilsgrunninum frameftir í størri mun fara til at hækka hámarksupphæddina, so hon komandi árini kann vaksa upp til eitt hóskandi støði. Felagið vísir eisini til skriv frá akademisku fakfeløgunum um betri barsilssømdir og javnstøðu millum foreldur, ið varð sent løgmanni og landsstýrismonnunum í fíggjarmálum og umhvørvis- og vinnumálum 14. september 2022, sí fylgiskjal 13. Hoyringarsvarið frá Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya er lagt við sum fylgiskjal 4.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur hesar viðmerkingar: Tá ið broytingar áður eru gjørdar í barsilslógini, hava hetta og undanfarin landsstýri m.a. raðfest at leingja tíðarskeiðið við barsilspeningi og at leggja lógarfesta eftirlønargjaldið oman á barsilspeningin. Nú, ið tíðarskeiðið við barsilspeningi er blivið 52 vikur eftir føðing, er tað fyrstu ferð, at hámarkið

fyri mánaðarliga barsilsútgjaldið verður hækkað. Barsilsgjaldið verður samstundis hækkað fyri at fíggja økta útgjaldið. Barsilsgjaldið er ásett soleiðis, at inngjøld og útgjøld javnviga í 2026, tá ið lógarfesta eftirlønargjaldið ikki longur hækkar. Fyrivarni verður tó tikið fyri óvissum í sambandi við framrokningarnar. Vísir tað seg eftir hetta, at yvirskot verður í Barsilsgrunninum, kann hugsast, at peningurin fer at verða brúktur til at hækka hámarkið enn meira.

Skrivið frá akademisku fakfeløgunum um betri barsilssømdir og javnstøðu millum foreldur snýr seg í stóran um viðurskiftir, ið eru skipað í kollektivum sáttmálum. Tó eru viðmerkingarnar um hámarkið fyri mánaðarliga barsilsútgjaldið og markingin av fleiri vikum við barsilspeningi til pápan og sammóðrina viðkomandi her. Sí reglubrotið beint omanfyri í mun til hámarkið fyri mánaðarliga barsilspeninginum. Hugskotið um at marka fleiri vikur við barsilspeningi til pápan og sammóðrina verður ikki tikið við í hesum umfari.

Fiskimálaráðið hevur ongar viðmerkingar. Sí fylgiskjal 5.

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við at hækka hámarkið fyri mánaðarliga barsilsútgjaldið, men heldur at 2.000 kr. um mánaðin er ein ov lítil hækking. Fyri at fíggja eitt hægri útgjald kundi útgjaldstíðarskeiðið verið stytt. Føroyski arbeiðsmarknaðurin hevur í longri tíð verið undir stórum trýsti vegna lágt arbeiðsloysi, og Føroya Arbeiðsgevarafelag vil leggja dent á týdningin av, at starvsfólk varðveita eitt gott samband við arbeiðsplássið.

Viðvíkjandi hækkingini av barsilsgjaldinum hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag tvær viðmerkingar. Fyrra er, at tað áður hevur vist seg at vera trupult at gera framrokningar í sambandi við inn- og útgjøld í Barsilsskipanini, og tí eiga vit at vera varin at fremja hækkingar, soleiðis at skipanin ikki gerst óneyðuga kostnaðarmikil. Onnur viðmerkingin snýr seg um, at barsilsgjaldið og ALS-gjaldið onkursvegna verða knýtt saman í lógaruppskotinum. Hóast hækkingin av barsilsgjaldinum og lækkingin í ALS-gjaldinum samanlagt er ein lækking fyri tey, ið rinda inn í skipanirnar, so er hetta einans støðan beint her og nú. Tað kann broytast aftur, tá ið arbeiðsloysið aftur finnur eitt meira vanligt støði ella hækkar, og neyðugt verður at hækka ALS-gjaldið aftur. Samanumtikið tekur Føroya Arbeiðsgevarafelag ikki undir við uppskotinum í verandi líki. Sí fylgiskjal 6.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur hesar viðmerkingar: Í mun til at stytta tíðarskeiðið við barsilspeningi fyri at fíggja eitt hægri útgjald er at siga, at tað leingi hevur verið eitt mál hjá skiftandi landsstýrum at leingja tíðarskeiðið við barsilspeningi til eitt ár eftir barnsburð. 1. januar 2021 varð tað málið rokkið. Hugskotið um at stytta tíðarskeiðið við barsilspeningi fyri at fíggja eitt enn hægri útgjald verður ikki gingið á møti á hesum sinni.

Fyri at fíggja økta útgjaldið úr Barsilsgrunninum er neyðugt at hækka barsilsgjaldið. Barsilsgjaldið er ásett soleiðis, at inngjøld og útgjøld javnviga í 2026, tá ið lógarfesta eftirlønargjaldið ikki longur hækkar. Fyrivarni verður tó tikið fyri óvissum í sambandi við framrokningarnar. Sambært rundskrivinum um lógarsmíð skal tað upplýsast undir punktinum um fíggjarligu avleiðingarnar, hvørjar tær samlaðu fíggjarligu avleiðingarnar eru, um

lógaruppskotið er partur av einum samlaðum lógarverki. Hóast broytingin av kunngerðini um ALS-gjald og hetta lógaruppskotið ikki eru partar av einum samlaðum lógarverki, hava bæði uppskotini ásetingar um arbeiðsmarknaðargjøld. Tí er broytingin av ALS-gjaldinum nevnd í hesum lógaruppskotinum.

Heilsuhjálparafelag Føroya hevur ta fatan, at hetta er ein gongd leið við at hækka útgjaldið úr Barsilsskipanini fyri at skapa javnstøðu millum kynini og eggja fleiri monnum at fara í barsil. Felagið hevur ikki aðrar viðmerkingar. Fylgiskjal 7.

Heilsumálaráðið metir ikki, at uppskotið hevur serligar avleiðingar fyri heilsuøkið og hevur ikki aðrar viðmerkingar. Sí fylgiskjal 8.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tekur undir við ætlaðu broytingunum. Sí fylgiskjal 9.

Samtak tekur undir við broytingunum og heitir á myndugleikar um at hyggja at møguleikanum fyri at fáa eitt minsta útgjald fyri tey, sum ikki hava eitt gott inntøkugrundarlag fyri útrokning av barsilsgjaldinum. Sí fylgiskjal 10.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur hesa viðmerking: Barsilsskipanin er ein arbeiðsmarknaðarskipan, ið endurrindar løntakarum lønarmissin, teir hava, ímeðan teir eru í barsilsfarloyvi. Hugskotið um eitt minsta útgjald úr Barsilsskipanini ber meira brá av eini almannaskipan og verður ikki gingið á møti á hesum sinni.

Samverk mælir til at góðkenna uppskotið og arbeiða víðari við at betra korini hjá teimum, ið fara í barsilsfarloyvi. Hámarksútgjaldið eigur at verða regulerað sjálvvirkandi, t.d. við at tað fylgdi lønarsáttmálanum hjá Samverki. Sí fylgiskjal 11.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur hesa viðmerking: Sjónarmiðið, um at hámarkið kann fylgja lønarsáttmálanum hjá Samverki, er áhugavert, og prinsippið verður brúkt í aðrari lóggávu, t.d. tá ið endurgjald verður veitt eftir arbeiðsskaðatryggingarlógini. Tó verður viðmerkingin ikki gingin á møti á hesum sinni.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur ongar viðmerkingar. Sí fylgiskjal 12.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Fíggjarligar avleiðingar fyri Barsilsskipanina

Verður hámarksupphæddin fyri útgjald úr Barsilsskipanini hækkað við 2.000 kr. um mánaðin, verður tað mett at økja útgjaldið úr Barsilsskipanini við 5,8 mió. kr. um árið. Hetta verður fíggjað við øktum inntøkum í Barsilsgrunnin við at hækka barsilsgjaldið við 0,03 prosentstigum, úr 0,86% upp í 0,89%. Mett verður, at hetta er júst nokk til at fíggja økta útgjaldið.

Tá ið broytingar fyrr eru gjørdar í KT-skipanini hjá Barsilsskipanini, hevur tað kostað uml. 33.000 kr. Væntandi fer kostnaðurin hesa ferð at vera á leið tann sami.

Fíggjarligar avleiðingar fyri almennar arbeiðsgevarar

Almennir arbeiðsgevarar rinda løn til løntakarar, ímeðan teir eru í barsilsfarloyvi. Arbeiðsgevarar, ið rinda løn undir barsilsfarloyvi, fáa endurrindað tann barsilspeningin, sum løntakarin hevði havt rætt til, um viðkomandi ikki fekk løn í sambandi við barsilsfarloyvi. Lógaruppskotið hevur við sær, at teir arbeiðsgevarar, sum rinda løn undir barsilsfarloyvi, kunnu fáa endurrindað upp til 27.000 kr. um mánaðin frá Barsilsskipanini í mun til 25.000 kr., sum støðan er nú. Viðmerkjast skal, at sbrt. § 15 a í barsilslógini er tað framvegis eitt krav, fyri at landsstýrið og stovnar undir landinum skulu fáa barsilspening, at starvsfólk verður sett í staðin fyri tann, ið fer í barsilsfarloyvi.

Allir arbeiðsgevarar rinda eitt gjald upp á 0,86% av øllum útgoldnum A-inntøkum til Barsilsgrunnin. Hetta gjaldið hækkar til 0,89% við hesum lógaruppskotinum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar umsitingarligar avleiðingar, enn at broytingar skulu gerast í KT-skipanini hjá Barsilsskipanini.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Barsilspeningur

Arbeiðsgevarar, sum rinda løn til løntakarar, ímeðan teir eru í barsilsfarloyvi, fáa endurrindað tann barsilspeningin, sum løntakarin hevði havt rætt til, um viðkomandi ikki fekk løn í sambandi við barsilsfarloyvi. Lógaruppskotið hevur við sær, at teir arbeiðsgevarar, sum rinda løn í sambandi við barsilsfarloyvi, kunnu fáa endurrindað upp til 27.000 kr. um mánaðin frá Barsilsskipanini í mun til 25.000 kr., sum støðan er nú. Lógaruppskotið hevur fyrimun við sær fyri teir arbeiðsgevarar, ið rinda oman fyri 25.000 kr. um mánaðin í løn til starvsfólk, ið fara í barsilsfarloyvi.

Barsilsgjald
Allir arbeiðsgevarar rinda eitt gjald upp á 0,86% av øllum útgoldnum A-inntøkum til Barsilsgrunnin. Hetta gjaldið hækkar til 0,89% við hesum lógaruppskotinum. Tað er ein øking upp á 0,03 prosentstig. Arbeiðsgevararnir fara kortini ikki at merkja økta barsilsgjaldið, tí samstundis sum hetta lógaruppskotið kemur í gildi, verður ALS-gjaldið lækkað úr 1% niður í 0,8%. Tað merkir, at arbeiðsmarknaðargjøldini lækka 0,17 prosentstig.

Umsitingarligar avleiðingar
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Barsilspeningur
Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri løntakararnar í Føroyum. Teir løntakarar, ið fara í barsilsfarloyvi, kunnu við hesum lógaruppskotinum fáa upp til 27.000 kr. í barsilspeningi um mánaðin umframt eftirlønargjaldið. Lógaruppskotið hevur fyrimun við sær fyri teir løntakarar, ið tjena oman fyri 25.000 kr. um mánaðin.

Barsilsgjald
Øll, sum fáa A-inntøku, sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, og sum hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár, rinda eitt gjald upp á 0,86% av øllum móttiknum A-inntøkum til Barsilsgrunnin. Hetta gjaldið hækkar til 0,89% við hesum lógaruppskotinum. Tað gevur eina øking upp á 0,03 prosentstig. Løntakararnir fara kortini ikki at merkja økta barsilsgjaldið, tí samstundis sum hetta lógaruppskotið kemur í gildi, verður ALS-gjaldið lækkað úr 1% niður í 0,8%. Tað merkir, at arbeiðsmarknaðargjøldini lækka 0,17 prosentstig. Av tí at ALS-gjald ikki verður rindað av inntøkum omanfyri 650.000 kr. um árið, fara teir løntakarar, ið vinna meira enn 650.000 kr. um árið, at fáa eina lutfalsliga lækking í arbeiðsmarknaðargjøldum.

Aldursmarkið á 67 ár fer frameftir at fylgja fólkapensjónsaldrinum sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd er viðkomandi fyri barsilslógina. Tó hevur hetta lógaruppskotið onga broyting í mun til sambandið millum barsilslógina og norðurlendska sáttmálan um almannatrygd.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tað er onki í lógaruppskotinum, sum er í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan, evropeiska mannarættindasáttmálan ella sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at lógaruppskotið elvir til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir; lógaruppskotið ger heldur ikki inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur við sær, at barsilsgjaldið upp á 0,86%, ið verður rindað av øllum útgoldnum og móttiknum A-inntøkum, hækkar upp í 0,89% frá 1. januar 2023. Barsilsgjaldið verður hækkað fyri at fíggja hækkingina á hámarkinum fyri barsilspening. Víst verður til frágreiðingarnar undir pkt. 2.1., 2.3. og 2.6. omanfyri.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hækkar barsilsgjaldið, ið verður goldið av øllum útgoldnum og móttiknum A-inntøkum. Hóast barsilsgjaldið eyðsæð er eitt gjald, er tað ikki eitt gjald, ið verður goldið sum ein samsýning fyri eina ítøkiliga tænastu ella veiting. Víst verður til viðmerkingarnar omanfyri undir pkt. 2.1. 2.3., 2.6. og 2.11.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella krøv um loyvi.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild til at áseta reglur í kunngerð um elektroniskt samskifti.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn omanfyri tilskilað.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri plass ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Nr. 1
Barsilspeningur er 100% av A-inntøkuni, sum løntakarin í miðal hevur móttikið seinastu 12 mánaðirnar undan barsilsfarloyvinum. Tó kann barsilspeningurin í mesta lagi vera 25.000 kr. um mánaðin umframt eftirlønargjaldið. Tá ið Barsilsskipanin varð sett á stovn í 2001 var hámarkið 35.000 kr. um mánaðin. Í 2004 varð hámarkið lækkað niður í 25.000 kr. um mánaðin og hevur síðan verið óbroytt. Í løgtingslógini er ein heimild til landsstýrismannin at hækka hámarkið við støði í lønargongdini í samfelagnum, men hon hevur ongantíð verið brúkt.

Lógarbroytingin hevur við sær, at hámarkið fyri mánaðarliga útgjaldið úr Barsilsskipanini verður hækkað við 2.000 kr.; úr 25.000 kr. upp í 27.000 kr. Á henda hátt fáa tey, ið vanliga vinna omanfyri 25.000 kr. um mánaðin, endurrindað upp til 27.000 kr. úr Barsilsskipanini, tá tey fara í barsilsfarloyvi.

Nr. 2
Aldursmarkið fyri tey, sum hava skyldu at rinda barsilsgjald, er frá og við 16 ár til og við 66 ár. Skotið verður upp, at aldursmarkið heldur skal fylgja fólkapensjónsaldrinum, soleiðis at skyldan at rinda barsilsgjald heldur uppat, tá ið persónar fáa rætt til pensjón. Ásett er í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., at fólkapensjónsaldurin hækkar úr 67 árum upp í 67 ½ ár og síðan 68 ár. Fyri at tað ikki skal vera neyðugt leypandi at broyta aldursmarkið í barsilslógini, verður ásett, at aldursmarkið fylgir fólkapensjónsaldrinum, sum hann er ásettur í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

Nr. 3
Barsilsgjald verður sum útgangsstøði goldið av allari móttiknari og rindaðari A-inntøku, men sbrt. § 18, stk. 1, nr. 1 eru fólka- og fyritíðarpensjónir undantiknar. Í almannapensjónslógini er nú ásett eitt nýtt slag av pensjón, sum nevnist “framskundað pensjón”, og barsilsgjald eigur ikki at verða rindað av hesi pensjón. Talan er ikki um ein nýggjan málbólk, men heldur at nakrir borgarar í staðin fyri fyritíðarpensjón nú fáa framskundaða pensjón. Í praksis verður framskundað pensjón útgoldin á sama hátt sum fyritíðarpensjón, og hesi rinda tí ikki barsilsgjald av pensjónini í dag. Tí verður skotið upp at tillaga barsilslógina til praksis, soleiðis at ongin ivi er um, at barsilsgjald heldur ikki skal rindast av framskundaðari pensjón.

Nr. 4
Barsilsgjald verður sum útgangsstøði goldið av allari móttiknari og rindaðari A-inntøku, men sbrt. § 18, stk. 1, nr. 2, í barsilslógini eru almannaveitingar undantiknar. Tó eru nakrar veitingar frá Almannaverkinum, ið barsilsgjald skal rindast av, og sum eisini telja við í útrokningargrundarlagnum, tá ið barsilspeningur skal roknast. Talan er fyri tað fyrsta um

dagpening sbrt. løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m. Hetta verður ikki broytt við hesum lógaruppskotinum. Endurgjald fyri inntøkumiss sbrt. § 17, stk. 3 í forsorgarlóginni er heldur ikki undantikið. Forsorgarlógin varð avtikin, tá ið løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur varð sett í gildi 1. januar 2021. Við lógarbroytingini verður tilvísingin rættað samsvarandi nýggju løgtingslógini um almannatrygd og tænastur. Talan er um eina fylgibroyting, sum ikki hevur materiellar broytingar við sær.

Harumframt verður lønaríkoyti til tillagað starv sambært løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk sett inn í § 18, stk. 1, nr. 2, soleiðis at barsilsgjald skal verða kravt av lønaríkoytinum. Talan er ikki um eina materiella broyting, men eina tillaging til praksis, tí barsilsgjald verður longu kravt av lønaríkoyti til tillagað starv. Barsilsskipanin er ein arbeiðsmarknaðarskipan, sum veitir endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku til løntakarar, ið fara í barsilsfarloyvi. Endurgjald verður eisini veitt fyri tær veitingar, ið koma í staðin fyri løn. Tí eigur barsilsgjald eisini at verða kravt av teimum veitingum, ið koma í staðin fyri løn.

Nr. 5
Samstundis sum útgjaldið úr Barsilsskipanini verður hækkað, er neyðugt við fleiri inntøkum til Barsilsgrunnin fyri at fíggja økta útgjaldið. Hetta verður gjørt við at hækka barsilsgjaldið úr 0,86% upp í 0,89%.

Nr. 6
Tað krevur heimild í løgtingslóg, um tað skal verða kravt av borgara ella fyritøku, at tey skulu samskifta við almennar myndugleikar elektroniskt ella talgilt. Í sambandi við, at ein nýggj KT-skipan til Barsilsskipanina verður fyrireikað, er neyðugt at fáa eina heimild í barsilslógina, soleiðis at tað kann verða kravt, at upplýsingar skulu latast Barsilsskipanini elektroniskt.

Sum nú er, verður umsóknarblað fylt út og sent Barsilsskipanini. Tað er bæði tíðarkrevjandi og ótíðarhóskandi. Ætlanin er, at í framtíðini skal søkjast um barsilspening umvegis teldu, snildfon ella teldil. Neyðugt verður sostatt at lata Barsilsskipanini upplýsingar elektroniskt um m.a. navn, væntað barnsburðardato, barnsburðardato, ættleiðingardato, kontunummar, um viðkomandi er einsamøll/einsamallur við barninum, longd á barsilsfarloyvinum og aðrar upplýsingar, sum eru neyðugar, fyri at viðkomandi kann fáa barsilspening úr Barsilsskipanini.

Til § 2
Stk. 1
Áseting um gildiskomu. Skotið er upp, at lógin kemur í gildi 1. januar 2023.

Stk. 2
Ásetingin hevur við sær, at mánaðarliga hámarkið upp á 27.000 kr. er galdandi fyri øll útgjøld úr Barsilsskipanini frá og við 1. januar 2023, uttan mun til hvat tíðarskeið útgjaldið er fyri.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 4. november 2022

Magnus Rasmussen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Akademikarafelag Føroya
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Almannamálaráðnum
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Fiskimálaráðnum
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Heilsuhjálparafelag Føroya
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 9: Hoyringarsvar frá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum
Fylgiskjal 10: Hoyringarsvar frá Samtaki
Fylgiskjal 11: Hoyringarsvar frá Samverki
Fylgiskjal 12: Hoyringarsvar frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum
Fylgiskjal 13: Skriv frá m.a. Akademikarafelag Føroya og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya um betri barsilssømdir og javnstøðu millum foreldur sent løgmanni, landsstýrismanninum í fíggjarmálum og landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum 14. september 2022